Brøndby heldur stílin

Størsta samrøðuevnið í donsku ítróttarpressuni í gjár var, at 24 ára gamalur maður doyði av døttinum, tá ið hann mótmælti, at FCK liðformaðurin varð rikin av vølli

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað er heyst í Danmark. Áhugin fyri fótbólti og superliguni er størri, enn hann nakrantíð hevur verið. Men tá ið oddaliðið Brøndby siglir sín egna sjógv, og lítið av nøkrum, sum er óvæntað, tekur seg upp, so verður tað eitt sindur trivielt.

Tá ið so ein syndarlig vanlukka sunnudagin í Parkini kostaði einum 24 ára gomlum FCK viðhaldsmanni lívið, var tað øgiligt, sum pressan skúmaði. Tilburðurin hevði sín uppruna í, at FCK liðformaðurin og miðverjin, Bo Svensson, varð rikin av vøllinum. FCK spældi móti Viborg, sum hevur tikið øll av bóli, tí jydarnir eru næstfremstir. Tað hevði eingin undan kappingarbyrjan roknað við.

Hjá FCK hevur tað gingið illa, og sunnudagin var einki undantak. Miðskeiðis í 2. hálvleiki var støðan framvegis málleysur javnleikur, tá ið dómarin hevði ostaskorpuna á lofti. Hann metti FCK liðformannin hava forbrotið seg so mikið, at hann skuldi vísast av vøllinum. Tað fall trongdu heimaáskoðarunum fyri bróstið, og hesin 24 ára gamli maðurin, sum var millum teir í ovaru røðunum, var so fortørnaður, at hann við ferð rann fram móti girðingini. Hann gjørdi so mikið nógv av, at hann datt út um girðingina. Fallið var stórt — onkur vildi vera við, at tað var níggju metrar, og aðra staðni søgdu teir 12-15 metrar. Norski miðvallarin hjá FCK, Magne Hoseth, var tann fyrsti, sum gjørdi dómaran varðugan við, at okkurt var spinnandi galið. Heilt skjótt varð ungi maðurin tikin upp og fluttur á Ríkissjúkrahúsið. Tað gjørdist deyðatøgn í Parkini, har eingin hugsaði um fótbóltsspælið, og dómarin bríkslaði dystin av. Seinni sunnukvøldið komu so boðini um, at 24 ára gamli FCK viðhaldsmaðurin var deyður.

Tilburðurin hevur skelkað danska fótbóltsheimin. Tað verður spurt, um trygdin í Parkini er, sum hon eigur at vera. Tað er hon, siga teir í DBU, eftir at teir hava kannað umstøðurnar.

DBU tók í gjár støðu til, hvussu tað skuldi verða við dystinum. Fleiri møguleikar vórðu frammanundan nevndir. Ein var, at nýggjur dystur skuldi ásetast, og ein annar er at bara tann løtan, sum var eftir, skuldi spælast. Viborg hevði týðuligan fyrimun, tá ið støðan var 0-0, og ein av FCK spælarunum var rikin av vøllinum.

Í gjár gjørdi DBU eina triðju niðurstøðu. Teir avgjørdu, at einki skal gerast við niðurlagda dystin. Úrslitið verður skrásett sum málleysur javnleikur.

Toppur og botnur

Við málleysa javnleikinum fyri niðurlagda dystin er Viborg framvegis næstfremst. Á odda er Brøndby, sum er rættuliga sannførandi. Leygardagin vóru teir í illfýsnum heystarveðri í Randers. Heimaliðið stríddist tað, sum teir kundu, og í fyrra umfarinum vóru teir heilt væl við. Tað varð mett ikki at vera sambært leikgongdini, at Brøndby legði seg á odda stutt undan steðginum. Í 2. hálvleiki gekk orkan hjá botnliðnum undan, og Brøndby vann 2-0.

FC Midtjylland hevði vitjan av FC Nordsjælland. FCM vann 2-0, og teir eru framvegis á heiðursmerkjaplássi. Tað tók sína tíð, áðrenn glið kom á málskjótingina. Hóast teir í FCN ikki vóru so væl mannaðir, og hóast teir vóru undir støðugum trýsti, so megnaðu teir at halda tørn, inntil tað restaði eitt korter. Tá kom hol á, og fýra minuttir fyri leiklok varð sigurin staðfestur.

Hesa ferð taldist hann ikki millum málskjúttarnar, men Mohammed Zidan hjá FCM var frágera væl upplagdur. Hann fekk eina ferð bóltin í málið, men dómarin kolldømdi fyri rangstøðu. Upptøkurnar vístu, at talan var um dómaramistak.

OB er á fjórða plássinum. Síðstu vikurnar hevur ikki gingið nakað serligt hjá teimum í Odense. Teir hava tapt tríggjar dystir, og talan hevur verið um krepputos, og møguleikin hevur verið nevndur, at venjararnir báðir skuldu fáa sekkin, tí spælararnir hava hildið tónan ikki verið hóskiligan. OB vann 3-0 á Silkeborg, og harvið tagnaði krepputosið í OB — fyribils í hvussu so er. Silkeborg er ikki leyst av niðurflytingarhóttanini. Teir eru bara eitt stig frammanfyri FCN, sum er næstaftast.

Nú kemur Esbjerg

Fyrsta triðingin av kappingarárinum gekk tað ógvuliga striltið hjá Esbjerg, sum síðsta kappingarár vann bronsu, eftir at teir leingi høvdu verið fremstir. Síðsta vikan hevur hilnast avbera væl hjá Esbjerg. Í trimum dystum hava teir fingið sjey stig. Sunnudagin vunnu teir væl spælda og intensa klassiska jyska uppgerð móti AGF. Úrstlitið var 3-1. Harvið hevur Esbjerg 17 stig og er bara eitt aftanfyri stórfeløgini AGF og AaB.

AaB vann heimadystin móti Herfølge 3-0, og sigurin var rættuliga sannførdur. Heimaliðið hevði eina ørgrynnu av málmøguleikum. Hetta var fimta ferðin á rað, at AaB fór av vøllinum uttan at hava tapt. Herfølge misti ein mann stutt undan steðginum. Eingin ivi man vera um, at teir í lítla felagnum á Sjællandi gleða seg til vetrarsteðgin. Men hann er framvegis meiri enn ein mánað burtur.

Frem á veg upp

Avrikið hjá Jón Róa Jacobsen og liðfeløgunum leygardagin var rættuliga sannførandi, meðan Fremad Amager tapti tepurt á útivølli

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Tað gongur strúkandi hjá Jón Róa Jacobsen og Frem. Leygardagin høvdu teir vitjan av Næstved, sum í summar flutti upp í næstbestu deildina. Uppflytararnir megnaði púrt einki at gera við Frem, sum í summar flutti niður úr superliguni. Úrslitið var glæsiligur 6-1 sigur, eftir at tað í steðginum hevði staðið 2-1. Jón Rói Jacobsen var allar 90 minuttirnar í Frem miðverjuni. Hesa ferð var hann tó ikki millum málskjúttarnar. Gunnar Nielsen var aftur hesa ferð eykamálverji hjá Frem.

Sigurin bar við sær, at Frem er næstfremst. Teir hava 24 stig og eru tvey stig aftanfyri oddaliðið. Á odda eru Johan Byrial Hansen og Horsens. Hesa ferð høvdu teir vitjan av niðurflytarunum úr AB, sum vórðu sendir aftur til Keypmannahavnar við 2-0 tapi.

Hjá Fremad Amager gekk ikki so væl. Teir vóru á útivølli móti SønderjyskE, og teir taptu 3-2. Sigursmálið fekk heimaliðið, tá ið tað restaðu tríggir minuttir.

Andrew av Fløtum var einasti føroyingurin, sum átti lut í Fremad Amager avrikinum. Hann varð settur inn í álopið, tá ið tað restaðu átjan minuttir, og støðan var 2-1 til heimaliðið. Níggju minuttir eftir at Andrew var komin á vøllin javnaði Fremad Amager, sum hevði ligið undir 2-0. So varð ein Fremad Amager rikin av vøllinum, og heimaliðið fekk sigursmálið.

Hjalgrím Elttør var við í Fremad Amager hópinum, men hann slapp ikki framat á vøllinum. Fremad Amager hevur 21 stig og er á fimta plássinum saman við Vejle. Sunnudagin var Vejle í Fredericia, har teir vunnu sannførandi 3-0. SønderjyskE er nú nummar trý, og HIK er á fjórða plássinum.

Danska superligan

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Brøndby (S)	12	8	-	3	-	1	20	7	13	27
2 Viborg	11	6	-	2	-	3	14	10	4	20
3 FCM	12	6	-	2	-	4	17	16	1	20
4 OB	12	6	-	1	-	5	24	17	7	19
5 AGF	12	5	-	3	-	4	20	16	4	18
6 Esbjerg	12	5	-	2	-	5	25	20	5	17
7 FCK (M)	11	4	-	4	-	3	18	19	-1	16
8 AaB	11	4	-	2	-	5	17	14	3	14
9 Silkeborg	12	4	-	1	-	7	21	24	-3	13
10 Herfølge	12	4	-	1	-	7	13	26	-13	13
11 FC Nordsj.	12	3	-	3	-	6	13	20	-7	12
12 Randers FC	12	2	-	2	-	8	10	26	-16	8

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 AC Horsens	12	8	-	2	-	2	24	10	14	26
2 Frem	12	7	-	3	-	2	26	9	17	24
3 Sønderjyske E	12	7	-	2	-	3	29	15	14	23
4 HIK	12	7	-	2	-	3	23	16	7	23
5 Fremad Am.	12	6	-	3	-	3	25	14	11	21
6 Vejle	12	7	-	0	-	5	32	27	5	21
7 Køge	12	5	-	5	-	2	29	17	12	20
8 Skjold	12	6	-	2	-	4	20	19	1	20
9 Fredericia	12	5	-	3	-	4	20	15	5	18
10 AB	12	5	-	2	-	5	20	20	0	17
11 NFA	12	3	-	3	-	6	24	27	-3	12
12 Brønshøj	12	3	-	3	-	6	20	28	-8	12
13 B 93	12	2	-	4	-	6	20	31	-11	10
14 Næstved	12	2	-	2	-	8	11	28	-17	8
15 Ølstykke	12	2	-	2	-	8	16	37	-21	8
16 Dalum	12	2	-	0	-	10	18	44	-26	6

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Danska 2. deild

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Brabrand	12	9	-	2	-	1	34	14	20	29
2 Glostrup	12	7	-	2	-	3	29	20	9	23
3 Jetsmark	12	7	-	2	-	3	30	22	8	23
4 Slagelse	12	6	-	3	-	3	23	17	6	21
5 Kolding FC	12	7	-	0	-	5	24	20	4	21
6 Holbæk	12	6	-	2	-	4	21	16	5	20
7 Lyngby	12	6	-	1	-	5	26	16	10	19
8 Næsby	12	5	-	3	-	4	17	16	1	18
9 Roskilde	12	6	-	0	-	6	14	20	-6	18
10 Aarhus Fr.	12	4	-	3	-	5	22	19	3	15
11 B 1909	12	4	-	3	-	5	12	16	-4	15
12 Hjørring	12	3	-	4	-	5	14	19	-5	13
13 B 1913	12	3	-	3	-	6	17	20	-3	12
14 Holstebro	12	3	-	2	-	7	15	22	-7	11
15 Kalundborg	12	2	-	3	-	7	20	29	-9	9
16 Værløse	12	1	-	1	-	10	9	41	-32	4

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

Húsið var í triðja heftinum

Tað gjørdist seðil nummar 101, sum vann íbúðina frá Høgna Mikkelsen á lutaseðlunum hjá HB

LUTASEÐLAR
Jákup Mørk
Myndir: Jens Kristian Vang

Tað gjørdist seðil nummar 101, sum vann stóra vinningin hjá HB-stuðlum

Talan var helst um størstu burturlutingina í Føroya søgu, tá HB hevði bílagt sær torgið í SMS fríggjadagin.

Síðani í vár hava HB-stuðlar selt lutaseðlar, har ein íbúð í Berjabrekku var høvuðsvinningurin, og sum vera man, so var spenningurin stórur, tá dragast skuldi.

At velja seðlar burtur úr stóru rúgvuni hevði HB fingið Bjarna Djurholm landsstýrismann, og mong mundu fylgja spent við, tá drigið varð.

Eftir at tíggju seðlar fyrst vórðu drignir upp úr stóra sekkinum, vórðu tølini á hesum lisin upp. Seinasti seðilin var sjálvandi tann, sum íbúðin var á, og hevði hesin nummarið, 101.

Tað vil við øðrum orðum siga, at vinnaraseðilin longu var farin, tá sett varð á trijða heftið av lutaseðlum, men tað mundi nú ikki oyðileggja gleðina hjá HB-stuðlunum. Tilsamans høvdu tey selt 20.000 seðlar, og við einum 100-krónu seðili fyri hvønn merkir tað, at ein millión lá eftir, eftir at íbúð og aðrir vinningar vóru goldin.

Sponsor-sáttmáli

Umframt at vinnarin av lutaseðlinum skuldi finnast, so varð høvið eisini nýtt til at undirskriva nýggja sponsoravtalu millum HB og SMS.

Sum vit nevndu í fríggjadagsblaðnum, so er hetta fyrsta ferðin, at SMS verður høvuðsstuðul hjá ítróttarfelag, og Rógvi Róin, sum umboðaði SMS helt fyri, at hetta var nakað, sum tey vóru ógvuliga spent uppá.

Somuleiðis frøddist Birgir Enghamar, formaður í HB, um nýggju avtaluna, sum fevnir um tvey ár. Undan hesum hevur Føroya Bjór verið høvuðsstuðul hjá HB, og teir halda so eisini fram, tó at tað nú verður á rygginum og ikki á bringuni, at teirra búmerki fer at síggjast.

Einki er at siga til, at stuðlarnir vóru nøgdir. Seinastu seðlarnir vórðu seldir í SMS fríggjadagin, og alt í alt liggur ein millión nú eftir hjá HB-stuðlum

Steinfinnur Mittelstein, Rógvi Róin og Birgir Enghamar skriva undir sponsoravtaluna, sum komandi tvey árini knýtir HB og SMS saman

Hondbóltsstøður

Sunset-kappingin

	dystir	v	-	j	-	v. t	t. mál	mál-málm.	stig
1 Stjørnan	3	3	-	0	-	0	76	60	16	6
2 Søljan	3	2	-	0	-	1	93	67	26	4
3 VB	3	2	-	0	-	1	83	65	18	4
4 Neistin	3	2	-	0	-	1	81	66	15	4
5 StÍF	3	1	-	1	-	1	74	77	-3	3
6 Kyndil	3	0	-	1	-	2	57	82	-25	1
7 VÍF	2	0	-	0	-	2	37	55	-18	0
8 Tjaldur	2	0	-	0	-	2	43	72	-29	0

Atlantic Airways-kappingin

	dystir	v	-	j	-	v. t	t. mál	mál-málm.	stig
1 VÍF	3	3	-	0	-	0	72	68	4	6
2 Kyndil	3	2	-	0	-	1	92	70	22	4
3 H71	2	1	-	0	-	1	63	53	10	2
4 KÍF	3	1	-	0	-	2	73	80	-7	2
5 StÍF	3	1	-	0	-	2	75	89	-14	2
6 Neistin	2	0	-	0	-	2	52	67	-15	0

Máltindarnir

Kvinnur

Nicoleta Radu Hansen	Søljan	33 (7)
Simona Petersen	Neistin	25 (6)
Alina Olaru	Stjørnan	24 (4)
Daiva Tuomaite	VB	24 (8)
Ioana Rápa	VÍF	23 (8)
Lina Andriulyte	Søljan	22 (2)
Lotte Sørensen	Kyndil	20 (6)
Aukse Vysniaskaite	VB	18
Heidi Maria Akselsen	Søljan	17
Ása Dam á Neystabø	Neistin	17 (1)
Rebekka Justinussen	StÍF	17 (4)
Rannvá Augustinussen	VB	16
Vesna Tomajek	Tjaldur	16 (6)
Poula D. Olsen	StÍF	15
Randi Wardum	Kyndil	14 (1)

Menn

Halgir D. Olesen	H71	21 (1)
Agnar Joensen	VÍF	20 (2)
Áki Mørk	Neistin	20 (3)
Sveinur Justinussen	StÍF	19 (3)
Damir Oros	Neistin	19 (5)
Piti Negru	H71	18
Henrik Gerster	H71	17 (1)
Ingi Olsen	VÍF	17 (2)
Eddie Joensen	KÍF	16
Høgni Klein	Kyndil	16
Hans Áki Dal-Christiansen	Kyndil	16 (2)
Gert Hansen	KÍF	13
Rókur A. Nielsen	Kyndil	13
Blagoje Buha	Neistin	13
Leivur Justinussen	StÍF	13 (1)